# Sól og summar

**Í fagra summarveðrinum hósdagin høvdu nógv fólk leitað sær út í Klaksvík. Summi vóru farin út í frítíðarplássið úti í Grøv, meðan onnur gingu og spákaðu í býnum og uppaftur onnur fríðkaðu um uttanfyri. Eisini hevði onkur leitað sær vegin niðan í fjøllini. Í øllum førum sást nakað av fólki ganga niðan á Klakkin**


*Sjálvt ísspeglarnir báðir úr Barometrinum, Heri Jacobsen og Kári Sólstein, høvdu leitað sær vegin norðureftir í summarið*

SUMMAR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Frítíðarplássið úti í Grøv er ein sonn perla, tá tað kemur til at fara eina útferð saman við familju ella vinum. Og tað vóru mong, sum nýttu høvi til tess í góðveðrinum hósdagin. Frítíðarplássið sær aftur út sum tað gjørdi, áðrenn ógvusliga skriðjulopið í tann 18. septembur 2000, tá tað nógva regnið oyðilegði ein stóran part av plássinum.

Og tað fegnast klaksvíkingar og norðoyingar um, tí vanligt er, at mong hava tað sum ein fastan tátt at leggja sær leiðina út har, tá veðrið er so gott, sum tað var hósdagin.

Og tað var sera stuttligt at síggja, hvussu børnini hugnaðu sær í ánni, har tey vassaðu og spældu so góð.

Onkur var enntá so djarvur at leypa á sjógv og svam í Borðoyavík, men um tað var so lýtt í veðrinum hósdagin, skal her vera ósagt. Men fólk hugnaðu sær í øllum førum.

Tað sást ikki bert úti í Grøv, at veðrið var gott. Nógv fólk vóru úti og spákaðu í býnum og helst allir barnavognarnir í Klaksvík, sum ikki vóru úti í Grøv, sóust í gøtunum hendan dagin.

Summi nýttu eisini høvi til at fríðka um uttan fyri húsini hjá sær. Fólk sóust mála og lúka ókrút og annað tílíkt. Og ongin ivi var um, at sólin var sterk og heit, tí nógv fólk vóru longu vorðin heilt reyð ella brún tíðliga seinnapartin.

Og sjálvandi vóru tað eisini mong, sum vóru í bønum og hoyggjaðu ella hongdu upp í turkilag. Og tað var lag á manni at fáa hoyggið turt, nú rættiligur hoyterri er. Hann sigur eisini frá góðum veðri í nakrar dagar aftur at, so um tað heldur sær, so kann tað væntast, at onkur fær alt hoyggið turt um vikuskiftið.

Summarið í ár hevur annars ikki verið tað stóra at reypa av. Onkrir góðir dagar hava verið bæði í mei, juni og juli, men munnu teir helst kunna teljast á aðrari hondini. So nú er tað bara gott, at fáa onkrar góðar dagar, meðan vit framvegis kunnu siga, at tað er summartíð.


*Veðrið var av tí fagrasta og her liggur Kalsoyggin í bakandi sól. Óivað hevur nógv verið hoyggjað í oynni henda dagin*


*Veðrið var av tí allarfagrasta hósdagin og her liggur Leirvík í bakandi sól*


*Hesar báðar fittu smágenturnar vóru millum tey mongu børnini, sum hugnaðu sær í ánni úti í Grøv hósdagin*



# Frændur spæla í Fuglafirði

**Leygarkvøldið fara Frændur at spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**


*Frændur fara leygarkvøldið at spæla til seinasta tiltakið á hesum sinni. Tað verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har dansur verður*

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Tað var sum sild í tunnu til tey bæði tiltøkini, tá Frændur spældu til dans í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum á ólavsøku. Nógv ungfólk leitaðu sær til dansin, og tey dugdu eisini at syngja við teir allar teir kendu Frændasangirnar.

Frændur fara leygarkvøldið at spæla til seinasta tiltakið á hesum sinni. Tað verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har dansur verður.

Eins og á ólavsøku verður Terji Rasmussen afturat Nolsøe-brøðrunum sum sangari. Teir, sum spæla undir, eru Rógvi á Rógvu, Agnar Lamhauge og Magnus Johannesen.

Frændur fara at spæla allar teir kendu sangirnar, sum teir hava givið út síðani 1984. Sangir sum Minnist tú gildið, Lívsmynd, Føroyar, Eros og aðrir rigga akkurát væl at spæla í dag, sum teir gjørdu, teir komu fram fyri nógvum árum síðani.

Tiltakið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði er leygarkvøldið frá klokkan 23.30 til 04.00 sunnunáttina.




-tað loysir seg!


# I AM roynd seg við nýggjum gittarspælara

**– Vit eru sera væl nøgdir við, at fyrsta konsertin hjá okkum við Arna gekk so væl, sigur Birgir Sigurðsson, sangari í I AM**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Á ólavsøku spældi gospelbólkurin I AM fyri fyrstu ferð saman við nýggja gittarspælara sínum til eitt størri tiltak. Arni Zachariasen er komin við í bólkin í staðin fyri Mikkjal Hvannastein, og frumframførslan var á gospelkonsertini í Badmintonhøllini ólavsøkudag.

– Arni spældi framúr væl. Vit eru allir sera væl nøgdir og glaðir fyri, at tað gekk so mikið væl. Eisini áhoyrararnir søgdu aftaná konsertina, at tað gekk væl hjá honum. Summi søgdu skemtandi, at tey hildu, at Mikkjal framvegis spældi við, sigur Birgir Sigurðsson, sangari í I AM.

200 fólk vóru til gospelkonsertina, og tað Birgir var nógv, tá hugsað verður um, at sólin bakaði niður, og at steypafinalan í fótbólti varð spæld samstundis.

Leygardagin fer I AM til Noregs, har teir skulu spæla á Kørre festivalinum. Teir spæla leygarkvøldið á midnátt. Tað er Adore Music, sum hevur fingið hesa ferð í lag, og teir ætla, at I AM eisini skal spæla til onnur tiltøk á ferðini.


*Birgir Sigurðsson, og hinir í bólkinum I AM eru sera væl nøgdir við nýggja gittarspælaran, Arna Zachariasen*